

(Mynd: nrk.no / BG Group)

# Eldur sløktur á boriskipi í Norðsjónum

**Ingi Samuelsen**

24.03.2015 - 07:16

Oljan.fo

Ongin kom til skaða, tá eldur kom í boriskipið Petrojarl í nátt á eini oljuleið vestan fyri Florø. Hetta skrivar nrk.no.

Boriskipið liggur á Knarr 2-økinum 63 fjórðingar vestan fyri Florø og verður rikið av felagnum BG Offshore. 100 fólk vóru umborð, tá eldur kom í.

Men eldurin kom skjótt undir tamarhald, skrivar nrk. Nakað eftir klokkan 5 í morgun, norska tíð, kundi løgreglan í Rogaland boða frá, at eldurin var sløktur og at tað ikki var neyðugt at flyta fólk av skipinum.